## Viðmerking:

# Forkunnug — men ikki nøktandi

**Um bókina "Myten om rigsfællesskabet" eftir Høgna Hoydal:**

Høgni Hoydal hevur fyrr víst at hann dugir at skriva. "Myten om rigsfællesskabet" er bert enn eitt dømi um, at Høgni hevur orðið í sínari makt. Bókin, sum kom út fríggjadagin 07.04.00 á forlagnum Lindhardt & Ringhof, er ein stutt lýsing av føroyskum politikki og søgu ígjøgnum 1000 ár, tó við serligum denti á heimastýristíðini.

**Tvinnar lýsingar**

Bókin kann lesast á ymsan hátt. Í fyrstu atløgu er talan um eitt yvirlit yvir føroyska søgu frá landnámi til í dag. Sum heild er talan um eina greiða og nøktandi gjøgnumgongd av teimum tíðarskeiðum og viðurskiftium, sum hava verið avgerandi fyri, at Føroyar og føroyingar eru tað tey eru. Tað er eyðsæð, at Høgni ikki fær lýst í allar krókar í Føroyasøgu. Men fyri tann, sum ikki kennir søguna frammanundan, er "Myten om rigsfællesskabet" ein góð og hugvekjandi byrjan.

Í aðru atløgu er talan um eina roynd at knýta søguna saman við politiska veruleikanum í Føroyum í dag. Heilt náttúrligt liggur denturin í hesum sambandi á tíðini síðani heimastýrisskipanin kom í gildið, men Høgni roynir eisini, við hepni, at knýta bond longur aftur í tíðina. Hetta er ikki minst áhugavert, tí at slíkar royndir eru so forkunnugar.

**Forkunnug roynd**

Serliga forkunnugt er tó at lesa royndir at skriva nútíðarsøgu. Tað letur til, at føroyingar fyrnast at seta nútíðarsøgu uppá skrift, og í staðin livir hon sítt ódámliga lív, sum tugga í ymsum munnum, og gerst minni og minni eftirfarandi, sum frálíður.

Tá so endiliga søgan skal skrivast, er fatanin so avlaga manna millum, at søguvísindin ongan møguleika hevur, til tess at rætta misfatanir og illgitingar. Hesar søguligu misfatanir og illgitingar vera í staðin grundarlagið undir nútíðarsøguni hjá yngri ættarliðum, og á henda hátt fáa vit "mytuna" í orðsins ringasta týdningi. Við at skriva nútíðarsøgu sleppa fólk í samtíðini at rætta misskiljingar og vísa á alternativar tulkingar.

Hendan møguleikan hevur Høgni Hoydal givið fólki við bók síni, og tað skal hann hava rós fyri. Spurningurin er so bara, um nakar tekur av avbjóðingini, ella um "Myten om rigsfællesskabet" skal standa einsamøll, fyri seinni at fáa støðu sum "søga". Um so verður, er einki vunnið.

**Ikki ein søgubók**

Vit mugu vera púra greið um, at bókin hjá Høgna *ikki* er ein søgubók. Hon er ein bók, sum er skriva við tí fyri eyga, at rættvísgera tann politik, sum sitandi landstýrissamgonga førir. Útgangsstøðið er, at tað er heimastýrisskipanin, sum koyrdi Føroyar á húsagang fyri 10 árum síðani. Hetta ger bókina hvørki verri ella betri, men lesarin má allatíðina hava í huga, at málið við bókini er at undirbyggja eina ávísa fatan av søguni.

Tað er her munurin liggur ímillum eina søgubók og bókina hjá Høgna Hoydal. Søguskrivarin letur tað vera upp til lesaran at avgera, hvussu søgan skal skiljast ella tulkast. Hin góði søguskrivarin megnar at vísa lesaranum á ymsar møguligar tulkingar, men letur tað vera upp til lesaran at avgera, hvør tulking er tann rætta. Í "Myten om rigfællesskabet" avgerð rithøvundurin fyri lesaran, hvør tulking er tann rætta. Bókin er politisk og eigur at vera lisin soleiðis.

**Rakar ikki mál**

Høvuðsmálið við bókini er at peika á væntandi fullveldi sum orsøk til ringt skil í Føroyum. Hetta er samstundis tann veiki parturin av bókini. Hóast sannførandi royndir eydnast tað ikki rithøvundanum at vísa á, at nakað samband hevur verið ímillum stjórnarligu viðurskiftini Føroya og Danmarkar ímillum, og kreppurnar báðar í 50'unum og 90'unum. Í staðin lýsir Høgni nakrar tilgongdir, sum fyrst og fremst eru føroyingum sjálvum fyri at takka ella brigda. Sum Høgni so væl sigur einastaðni í bókini, so er heimastýrisskipanin bara ein formellur karmur um tað politiska og fyrisitingarliga virksemið í Føroyum. Sum Høgni sjálvur vísir á, hevur hesin karmur bæði rúmað ábyrgdarfullum arbeiðssemi eins væl og fyrilitarleysum ódugnasemi. Niðurstøðan er, at hóast karmurin hevði verið ein annar, var eingin trygd fyri at innihaldið ikki hevði verið tað sama.

**Millum reglurnar**

Samanumtikið eydnast ikki Høgna Hoydal at føra sannførandi prógv fyri, at heimastýrisskipanin hevur verið føroyska samfelagnum at skaða. Eftir próvførsluna stendur í staðin ein mynd av einum samfelagið, har ávísir samfelagsbólkar hava gjørt sær dælt, vælvitandi at tað fór at kostað øðrum samfelagsbólkum dýrt í seinasta enda.

Slíkum ber ikki til at tryggja seg ímóti stýrisskipanarliga, uttan so, at demokratii verður vrakað sum grundhugsan. Veikleikin við demokratinum er, at tann klóki kann lumpa tann minni klóka til at taka avgerðir, sum gagna tí klóka men skaða tann minni klóka.

Úrslitið er, at tann klóki hevur buktina og báðar endarnar. Við at lesa bókina kemur tíðiliga til sjóndar, at trupulleikarnir í Føroyum fyrst og fremst snúgva seg um samfelagssinni og politiskan moral, og so gott sum einki hava við sjálva stjórnarskipanina at gera. Eitt demokratiskt samfelag fær tað stýrið tað hevur uppiborið. Sum Høgni vísir á, so vóru tað føroyingar — og ikki danska stjórnin — sum skuldarbundu og kollrendu føroyska samfelagið.

Hóast tað stóð landsstýrinum frítt fyri at avmarka lántøkurnar uttanlands í 80'unum og soleiðis temja búskapin, so *valdi* landsstýrið at lata vera. Og hóast tað stóð Løgtinginum frítt fyri at tala at og geva landsstýrinum boð um at steðga peningaflutninginum til landið, so *valdi* Løgtingið at lata vera.

Og hóast tað stóð føroyska fólkinum frítt fyri at velja eitt Løgting, sum tók tær nógvu kreppuávaringarnar í álvara, so *valdi* føroyska fólkið at lata vera. Høgni Hoydal meinar at øll hesi val høvdu verið øðrvísi um Føroyar høvdu havt fullveldið, men tað er og verður ein trúðarspurningur.

**Sjálvmótsøgn**

Høgni Hoydal hevur skrivað eina bók, sum hevur uppiborið at vera lisin. Men um ætlanin við bókini hevur verið at siga seinasta orðið í fullveldiskjakinum, so eydnast hetta ikki. Somu stóru spurningar standa framvegis ósvaraðir aftaná at bókin er lisin. Fyrst og fremst stendur sjálvandi spurningurin um, hví landsstýrið hevur sovorðnan skund við at fáa tað formella uppá pláss, meðan alt tað innihaldsliga — stýrisskipanin, fyrisitingin og búskaparstýringin — alt kann bíða til seinni.

Høgni Hoydal sigur, at heimastýrisskipanin er bara ein formellur karmur, og tí einki virði hevur í sær sjálvari. Samstundis er hann fremsti talsmaður fyri at gera ein nýggjan formellan karm um samfelagið, sum eitur fullveldið. Tað, sum Høgni skyldar at greiða fólkið frá er, hví tann formelli karmurin er so týdningarmikil, tá hann einki virði hevur í sær sjálvum.

**Hví á donskum?**

At enda má eg harmast um, at Høgni ikki hevur skrivað eina bók á føroyskum, til føroysku veljararnar, har hann greiðir frá, hví teir skulu velja fullveldi fram um heimastýri ella sjálvsstýri. Í tí politiska høpinum haldi eg tað vera løgi, at Høgni fyrst og fremst vendir sær til danskar lesarar. Hetta hevur tó einki við bókina at gera. Hon er skrivað og skal lesast, sum tað hon er: Ein bók á donskum skrivað til danskar lesarar.

**09.04.2000**
**Jóanes N. Dalsgaard**

# Bert álit skapar semjur

Tað ber væl til at fáa bæði fólkaskúlan fullvirknan, ein vælvirkandi arbeiðsmarknað og álitið á okkara politisku skipan bygt uppaftur. Men tað hendir ikki eftir einum degi ella einum ári. Verri enn so. Og um politiskur løtuvinningur framvegis skal vinna á ábyrgdini og politiskum støðufesti, so verður tað ongantíð.

Vit kunnu og mugu ikki lova, at allir teir trupulleikar, sum eru skaptir gjøgnum 10-tals ár, verða loystir beinanvegin. Vit kunnu bert vísa á varligar betringar, ið okkara egni búskapur og førleiki kann bera. Bert soleiðis kunnu vit sleppa undan brotnum lyftum og støðugum misáliti.

Øll harmast vit um verkfallið í fólkaskúlanum, og í seinastuni hava øll amboð verið nýtt til at gera støðuna uppaftur truplari. Lagt verður beinleiðis eftir persónum, partapolitikkur og løgting verða drigin uppí, og fordómarnir móti bæði politikarum og lærarum nørast í samfelagnum.

Ósemjan millum Lærarafelagið og myndugleikar hevur øll elementini til at gerast ein eldfim blanding.

**Fýra høvuðstrupulleikar**

Talan er um 4 høvuðstrupulleikar, ið allir hava ávirkan á støðuna og úrslitið.

1. Ein fólkaskúlalóg verður samtykt undir undanfarna landsstýri, har tær fíggjarligu og umsitingarligu avleiðingarnar ikki eru nóg væl greinaðar og lýstar — og har nógvir ymsir møguleikar og nógvar metingar kunnu gerast um, hvat krevst.

2. Arbeiðsviðurskiftini, uppgávurnar og gerandisdagurin hjá fólkaskúlalærarum hevur leingi havt tørv á at verða lýstur og lagdur í greiðari karmar — bæði undir gomlu lógini, og ikki minst í samsvari við, at tættirnir í nýggju fólkaskúlalógini skulu setast í verk og fáast at virka til fulnar úti á skúlunum.

3. Lønarviðurskiftini og onnur rættindir hjá lærarum skulu ásetast í samráðingum, eftir mong ár við ongum ella lítlum lønarvøkstri.

4. Nógvir politikarar hava hug at lasta hvørjum øðrum fyri forsøguna, og nógvir politikarar hava hug at vinna sær politiskan løtuvinning í einum verkfalli, sum rakar eina miðleingju í samfelagnum og harvið allar føroyingar og øll pláss í landinum. Tí verður løgtingið nú drigið uppí.

Einasti møguleiki at loysa ósemjuna, er at skilja hesar trupulleikar sundur og fara undir at loysa teir hvør sær. Undirritaði og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava leingi ynskt at komið til samráðingarborðið til tess at greiða fløkjuna. Tað krevur álit á, at loysnin tildømis fæst soleiðis:

**Trupulleiki 1**

Tann fyrsti trupulleikin við fólkaskúlalógini er ein spurningur millum landsstýrið og løgtingið, sum snýr seg um lóggávuarbeiði, umsiting og raðfestingar á fíggjarlógini.

Undirritaði hevur gjørt greitt, at eg fegin vil taka stig til at gera eina gjøgnumlýsing og koyriætlan yvir eitt áramál fyri, hvussu nýggja fólkaskúlalógin fæst at virka til fulnar. Hetta vil Undirvísingar- og mentamálastýrið fegin gera í tøttum samstarvi við Lærarafelagið, kommunur, skúlaleiðslur, skúlanevndir og foreldraráð. Men ábyrgdin fyri, at ymsu tættirnir verða settir í verk við kunngerðum og rundskrivum, og at neyðuga játtanin fæst, liggur hjá landsstýrismanninum, sum stendur til svars fyri løgtinginum. Hetta kann ikki bindast í ein sáttmála við triðjapart.

**Trupulleiki 2**

Tann næsti trupulleikin um álagdar uppgávur og arbeiðsviðurskifti sum heild hjá lærarum, er ein spurningur, sum Undirvísingar og mentamálastýrið hevur ábyrgdina av at fáa greinaðan saman við Lærarafelagnum, so rættvís løn fyri útint arbeiði kann verða grundarlag undir øllum komandi sáttmálum. Tíverri eydnaðist ikki einum arbeiðsbólki við umboðum fyri allar partar at semjast um hetta áðrenn sáttmálin fór úr gildi. Men tað má bera til at semjast um, hvussu veruleikin sær út.

**Trupulleiki 3**

Tann triði trupulleikin er sjálvur sáttmálaspurningurin. Hetta er ein spurningur millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag, har tó Undirvísingar- og mentamálastýrið tekur lut við fakligum spurningum og ivamálum. Her má landsstýrið eisini taka atlit til allar aðrar fakbólkar og tryggja rættvísar lønar- og starvssáttmálar sum heild inna tað almenna. Hartil má landsstýrið taka atlit til landskassan og samfelagsbúskapin, tá sáttmálar verða gjørdir, so skerjingar ikki mugu gerast aftaná. Lærarafelagið skal sjálvsagt stríðast fyri at fáa so gott úrslit sum gjørligt fyri sínar limir. Millum hesi ymisku áhugamál, skal semja fáast.

**Trupulleiki 4**

Tann fjórði trupulleikin er ein spurningur um ábyrgdarfullar politikarar, sum ikki bert dyrgja eftir politiskum løtuvinningi ella seta ymiskt í verk, har hvørki fígging ella ætlanir halda í longdini. Tíverri hava vit longu sæð, at bæði andstøðu- og samgongupolitikarar royna at gera sær dælt av ónøgdini hjá okkum øllum og sáa misálit millum fólk. Eisini hesaferð verður fullveldi, sum hin gråbeinti hongt á veggin til syndabukk. Hartil verður eitthvørt høvi brúkt til at sáa iva um álitið á landsstýrismenn og landsstýrið. Hesin trupulleiki kann bert loysast við, at vanlig siðvenja, um ikki at gera sáttmálasamráðingar partapolitiskar, verður hildin.

Øll hava merkt, hvussu tað er, um dúvað verður uppá, at løgtingið skal loysa trupulleikar á arbeiðsmarknaðinum. Tá eru ongin vunnin rættindi og ongar varandi semjur. Tá kunnu viðurskiftini bert skerjast, tá tað fjarar í kassanum, sum jú er hent so ofta.

**Bert ein háttur**

Tí er bert ein vegur: Um álit var á, at hesir trupulleikar við fólkaskúlanum vórðu sundurskildir og loystir, uttan at kasta fordómar og misálit hvør á annan, so hevði arbeiðsósemjan verið loyst. Og júst hetta álit mugu vit politikarar nú stremba eftir at skapa. Annars verður bert talan um terrorjavnvág.

Hugsi at tað fer at taka fleiri ár, men uttan hetta grundleggjandi álit ræður bert vónloysi, ónøgd og mistreysti. Og tá fáa vit neyvan ein góðan fólkaskúla ella nakað annað gott burturúr.

**Høgni Hoydal**
**landsstýrismaður**